# Fleiri vitni til harðskapsmálið

**Ferðaliðið hjá Ríkispolitinum verður ikki liðugt hesa vikuna við at kanna hendingina undir Summarfestivalinum í Klaksvík, har tveir løgreglumenn vórðu meldaðir fyri harðskap**



Randi Jacobsen

Tvey fólk frá ferðaliðnum hjá Ríkispolitinum eru farin undir at avhoyra fólk, sum vóru vitni til hendingina, tá ið tveir politistar handtóku tveir 17 ára gamlar dreingir undir Summarfestivalinum. Teir báðir politistarnir vóru meldaðir fyri at hava framt harðskap.

Peter Thaysen, løgregluovasti veit ikki, hvussu tað gongur við avhoyringunum, tí ferðaliðið arbeiðir leyst frá politinum í Føroyum.

Einasta uppgávan hjá politinum her er at skriva niður nøvn og telefonnummar hjá vitnunum og geva hesar upplýsingar víðari til ferðaliðið.

Løgregluovastin veit tó, at tað alla tíðina koma nýggj vitni afturat, og seinast, hann visti, vóru yvir 15 vitni, sum skuldu avhoyrast.

Hetta eru fólk, sum arbeiddu sum vaktir, stóðu í sølubúðunum og onnur, sum bara vóru har.

### Drúgvar avhoyringar

Tað eru bara komin tvey fólk frá ferðaliðnum at gera avhoyringarnar, og meta tey, at tað er ov lítið fyri at kunna gera arbeiðið liðugt innan fyri rímiliga tíð, senda tey boð eftir fleiri fólkum frá ferðaliðnum.

Peter Thaysen heldur tað vera ilt at vita, nær kanningin er liðug, men hesa vikuna verður tað ikki, sigur hann.

Um nakar hevur tikið myndir av hendingina, veit hann ikki.

*randi@sosialurin.fo*



# H1N1-umfarsjúkan avblást

**Læknar hava ikki longur skyldu til at boða Landslæknanum frá, tá ið teir koppseta fólk móti H1N1**

Randi Jacobsen

Heimsheilsustovnurin WHO hevur boðað frá, at H1N1 ikki longur verður mett sum umfarssjúka og í gjár kom ein kunngerð, sum sigur, at læknarnir ikki longur hava skyldu til at boða heilsumyndugleikunum frá, tá ið teir hava koppsett fólk móti H1N1. Í Føroyum er tað Landslæknin, sum skal hava fráboðanir um koppseting móti smittandi sjúkum.

Tá ið sjúkán visti seg í fjør, óttaðust heilsumyndugleikarnir tað ringasta, og farið varð undir at koppseta fólk.

- Vit vænta ikki nógvar fleiri tilburðir. Ta síðstu tíðina hava eingir trupulleikar verið, men so fáa vit at síggja, hvussu verður, tá ið veturin og kuldin koma, sigur Kristine Holk, virkandi landslækni.

Hildið verður tó eyga alla tíðina við, um tað koma nýggir tilburðir.

Tað var nokkso ymist, hvussu stóra nøgd av H1N1-heilivági londini bíløgdu. Summi keyptu so nógv, at tey høvdu nóg mikið til at koppseta alt fólkið tvær ferðir. Tað gjørdu Danmark og Føroyar langt frá, og tey brenna tí ikki inni við stórari nøgd.

Tað eydnaðist ikki í dag at fáa at vita frá apoteksverkinum, hvussu stór goymslan í Føroyum er.





www.autoservice.fo
Auto Service
Undir Krákugjógv 19 · Tel: 34 54 00 · as@autoservice.fo

Keypir tú ein nýggjan bil frá okkum, fært tú GULLPAKKAN ókeypis

NISSAN

B QASHQAI nýtsla (blandað koyring): 11,9-19,2, CO2 129-199 g/km. QASHQAI+2 nýtsla (blandað koyring): 11,9-17,5 km/l, CO2 139-208 g/km. Euro NCAP: 23.05.2007. Prísurin er uttan avhandanarkostnað uppá Kr. 2.550,-. Nýbilsgaranti 3 ár/100.000km, 3 ára lakkgaranti (ongar km avmarkingar), 12 ár ímóti gjøgnumtering. Bilurin kann vera vístur við eykaútgerð.